## Heimsmet í trístøkk

Ókendi fraklendingurin, Teddy Thamgo, hevur sett nýtt heimsmet í trístøkk við 17,90 metrum, sum enntá er 32 sentimetrar meira, enn hann higartil hevur lopið. Gamla metið upp á 17,83 metrar átti svenskarin, Christian Olsson, og eftir langa lopið viðgekk Thamgo, at hann ikki hevði trúð, at nakar fór at taka tað metið – og so slett ikki, at hann sjálvur skuldi fara at gera tað!



## Arnesen leitar eftir børnum

Frank Arnesen er ítróttarstjóri í enska stórfelagnum Chelsea, og ein av hansara stóru uppgávum er at finna heilt ungar fótbóltsspælarar til felagið. Kappingin um talentini er harðari enn nakrantíð, og í Chelsea leitar teir dúgliga eftir spælarum um átta ár aldur. – Vit hava 60 talentleitarar í London, og vit brúka nógva tíð til at finna teir bestu átta ára gomlu spælararnar, sigur Arnesen við Idrætsliv. Chelsea hevur sáttmála við umleið 140 spælarar í aldrinum frá átta til 19 ár.

# Pipar & Salt arga Neistan




Menninir hjá Neistanum missa heimadyst í møguligu triðju FM-finaluni
Mynd: Álvur Haraldsen

**Verður neyðugt við einum triðja finaludysti í FM-finaluni hjá monnum, verður hesin spældur í Kollafirði**




Jákup Mørk

Skipanin er annars so, at ovasta liðið í landskappingini fær fyrimunin av heimavølli í triðja finaludystinum, um hesin verður neyðugur.

Men tað er so ein fyrimunur, sum Neistin ikki fær. Annan páskadag, sum er dagurin, har ein triðja finala skal spælast, er nevnliga brúdleyp í Ítróttarhøllini á Hálsi, tá Esmar Eysturoy skal giftast síni Guðrun.

Og tað er ein hending, sum tað ikki ber til at flyta uttan víðari.

Eftir øllum at døma ber heldur ikki til at flyta FM-finaluna, og tí er avgerð tikin um, at verður neyðugt við einum triðja dysti, so verður hesin í høllini í Kollafirði.

### Máltindarnir, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 184 (16) |
| Liljan Djurhuus | VÍF | 133 (43) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 124 (20) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 116 (23) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 113 (19) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 110 (22) |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 90 (5) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 83 (23) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 74 |
| Heidi Joensen | VÍF | 68 (7) |
| Migle Senvaityte | VB | 68 (32) |
| Adriana Bobra | StÍF | 63 (34) |
| Fríðrún B. Danielsen | StÍF | 62 |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 61 |
| Una Egilsdóttir | VB | 59 (16) |

| Atlantic Airways-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| David Edvardsen | Neistin | 147 (30) |
| Sámal Joensen | VÍF | 122 (38) |
| Poul Kjartan Dam | H71 | 107 (15) |
| Cristian Preda | StÍF | 103 (6) |
| Dánjal Tórgarð | H71 | 102 (38) |
| Bjarti Hansen | VÍF | 98 |
| Finnur Hansson | Neistin | 89 (11) |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 87 (1) |
| Janus Sørensen | H71 | 75 |
| Høgni Klein | Kyndil | 75 |
| Gabriel Stanciu | StÍF | 74 (28) |
| Niklas Reginsson | KÍF | 72 (7) |
| Agnar Joensen | VÍF | 72 (7) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 71 (21) |
| Ási Dam | KÍF | 70 (40) |

### Flogbóltur

**Eik-liganin, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 18 | 16 | - | 2 | 50 | 13 | 37 | 21 |
| 2 TB | 18 | 14 | - | 4 | 47 | 21 | 26 | 19 |
| 3 Fleyr | 18 | 11 | - | 7 | 38 | 27 | 11 | 15 |
| 4 Mjølnir | 18 | 11 | - | 7 | 39 | 27 | 12 | 14 |
| 5 Dráttur | 18 | 8 | - | 10 | 34 | 32 | 2 | 11 |
| 6 ÍF | 18 | 3 | - | 15 | 10 | 46 | -36 | 4 |
| 7 KÍF | 18 | 0 | - | 18 | 2 | 54 | -52 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 17 | 14 | - | 3 | 44 | 16 | 28 | 21 |
| 2 SÍ | 17 | 13 | - | 4 | 43 | 23 | 20 | 20 |
| 3 Fleyr | 18 | 7 | - | 11 | 37 | 38 | -1 | 10 |
| 4 ÍF | 20 | 0 | - | 20 | 4 | 51 | -47 | 0 |

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 19 | 17 | - | 1 | - | 1 | 551 | 389 | 162 | 35 |
| 2 Tjaldur | 19 | 15 | - | 1 | - | 3 | 545 | 416 | 129 | 31 |
| 3 Neistin | 19 | 11 | - | 0 | - | 8 | 496 | 453 | 43 | 22 |
| 4 VÍF | 19 | 6 | - | 0 | - | 13 | 460 | 531 | -71 | 12 |
| 5 StÍF | 19 | 5 | - | 0 | - | 14 | 447 | 563 | -116 | 10 |
| 6 VB | 19 | 2 | - | 0 | - | 17 | 414 | 561 | -147 | 4 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 18 | 15 | - | 0 | - | 3 | 590 | 485 | 105 | 30 |
| 2 VÍF | 18 | 9 | - | 0 | - | 9 | 529 | 514 | 15 | 18 |
| 3 H71 | 18 | 6 | - | 3 | - | 9 | 480 | 489 | -9 | 15 |
| 4 StÍF | 18 | 7 | - | 1 | - | 10 | 464 | 485 | -21 | 15 |
| 5 KÍF | 18 | 7 | - | 1 | - | 10 | 465 | 498 | -33 | 15 |
| 6 Kyndil | 18 | 7 | - | 1 | - | 10 | 439 | 496 | -57 | 15 |